Sosialurin



## Javnstøða:

# Hægri útbúgving ong




**Hóast alt fleiri kvinnur lúka framúr góð prógv á hægsta stigi, so fáa tær ikki meira vald ella hægri løn. Yngri kvinnurnar eru nevniliga líka langt burtur frá best løntu størvunum sum mammur og ommur teirra. Kanningar vísa, at kvinnurnar framvegis uppliva valið millum familjulív og karrieru sum ein stóran trupulleika**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá Javnstøðunevndini stendur mong áhugaverd grein at lesa. Eitt nú verður víst til eina nýggja kanning um kvinnur, karrieru og útbúgving, sum danska vikubrævið A4 hevur latið gjørt.

Niðurstøðan av kanningini er, at hóast kvinnurnar seinastu ártíggjuni hava tikið langar og høgar útbúgvingar, hevur tað kortini ikki eydnast teimum at fáa størri part av teimum væl løntu størvunum. Sostatt eru 79 prosent av samfelagselituni enn menn, og myndin er nøkulunda eins í øllum aldursbólkum.

### Standa í køkinum

Kanningina hevur Arbejderbevægelsens Erhvervsråd gjørt fyri Ugebrevet A4, og setir hon fokus á "nýggju elituna" – tey átta prosentini, sum hava hægstu inntøkurnar og longstu útbúgvingarnar. Ella tey somu, sum áður komu undir heitið sosialbólkur 1.

- Kanningin átti at latið eyguni upp á teimum nógvu, sum halda, vit hava javnstøðu í Danmark. Tað er mikið rætt, at fleiri kvinnur taka universitetsútbúgving. Men tá prógvtøkan er av, eru tað menninir, sum førka seg uppeftir, meðan kvinnurnar verða standandi í køkinum við børnunum, sigur Karen Sjørup, granskari við Roskilde Universitetscenter.

### Prógvið lítla ávirkan

Higartil hevur verið hildið, at so hvørt sum kvinnurnar tóku hægri og hægri útbúgvingar, fór javnstøðan á arbeiðsmarknaðinum at hækka. Í bólkinum hjá teimum 60-64 ára gomlu eru bara 29 prosent av teimum, sum hava hægri útbúgving, kvinnur. Millum tey ungu undir 35 hava umleið helmingurin hægri útbúgving.

Men nýggja kanningin vísir, at framgongdin á útbúgvingarøkinum hevur ógvuliga avmarkaða ávirkan á kynsbýtið á arbeiðsmarknaðinum. Kvinnuligi parturin av elituni er nakað hægri í yngru ættarliðunum, men sjálvt í teimum best útbúnu árgangunum er parturin av kvinnum bara 23-24 prosent.

Kanningin vísir eisini, at 11 prosent av monnunum í elituni hava eina bruttoinntøku á yvir eina millión, meðan hesin parturin av kvinnunum í elituni er 5 prosent.

### Seta kend fólk í starv

Sambært serfrøðingunum eru fleiri forðingar eftir hjá kvinnunum, tá tær hava fingið prógvið í hondina. Í hesum sambandi er ein forðing menninir. Karen Sjørup sigur, at:

- Nógvar kvinnur føla ikki, at tær verða bodnar inn í maskulina umhvørvið, har valdið verður býtt út. Mannligir leiðarar hava tað við at velja aðrar menn.

Jeanette Løgstrup, er kunningarstjóri í tryggingarfelagnum Codan, og ein av høvundunum handan bókina "Kunsten at gøre karriere". Hon vísir á onnur viðurskifti á arbeiðsmarknaðarmentanini:

- Í nógvum fyritøkum hava relatiónir framvegis nógv at siga, tá størv skulu setast. Tað merkir, at fólk hava lyndi til fyrst og fremst at velja tey, tey kenna – og harvið verður tað ofta eitt val millum Rip, Rap og Rup. Leiðslan velur nøkur út, sum líkist henni sjálvari, sigur Jeanette Løgstrup.

### Barnleysir kvinnuligur stjórar

Fyritøkurnar mugu arbeiða miðvísari við at útvega starvsfólk á einum breiðari grundarlagi, har kvinnur eisini koma við. Men grundleggjandi er orsøkin til skeivleikan tvístøðan millum karrieru og familjulív, sigur hon.

Nógvar kvinnur uppliva hetta sum eitt antin-ella, heldur hon. Kanningar vísa, at fjórði hvør kvinnuligur toppstjóri er barnleys. Tær hava rætt og slætt valt karrieruna fram um børn. Og júst hetta valið vilja aðrar kvinnur ikki taka. Tí steðga tær karrieruni, sigur Jeanette Løgstrup.

### Velja karrierumenn

Sambært granskaranum Karen Sjørup, økjast trupulleikarnir við at fáa karrieru- og familjulív at hanga saman, tí kvinnurnar ikki vænta, at maðurin tekur sær av heimi og børnum.

Men karrierukvinnurnar gera tað heldur ikki lættari fyri seg sjálvar. Kanningin vísir nevniliga, at næstan helmingurin av teimum giftu kvinnunum í elituni hava valt ein mann, sum eisini hoyrir til elituna. Harvið kunnu tær ikki rokna serliga nógv við honum heima við hús. Til samanberingar hava bara 6% av kvinnunum uttan fyri elituna valt ein elitumann.

- Tað ger ikki júst dilemmaið hjá karrierukvinnunum minni, tí dupultkarrierufamiljur hava jú ov lítla tíð til børnini, sigur Karen Sjørup.

### Mexikanska húshjálpin

At barnaansingarmøguleikar hava nógv at siga í sambandi við hugin hjá kvinnum at gera karrieru, vísa eisini fleiri altjóða kanningar. Í USA eru fleiri karrierukvinnur enn í Danmark:

- Ein møgulig orsøk er munurin á barnaansing í hesum báðum londunum.